jaf.fo

# VIT FLYTA




Lýsing av hvussu tætt lesandi uttanfyri norðurlond eru knýtt at føroyska samfelagnum

JAVNAÐARFLOKKURIN
á Fólkatingi

## Formæli

# Tey rýma ikki longur enn hini

Tann størsta avbjóðingin hjá føroyska samfelagnum er, at so nógv ung flyta burtur – fyrst og fremst at útbúgva seg - og ikki venda heimaftur.

Nógv hevur verið kjakast og skrivað um hetta seinastu árini, men tá tað snýr seg um tey, sum ikki flyta til Danmarkar – t.e. 15 % - hava tær politisku avgerðirnar bygt á rættiliga avmarkaða vitan.

Nýggjasta íkastið í kjakinum um hesi er at finna í játtanarkørmunum fyri 2014, har lagt verður upp til, at stuðulin til tey lesandi uttanfyri Norðurlond lutvíst verður lagdur um til lán.

Javnaðarflokkurin á Fólkatingi hevur nú – í samstarvi við fleiri partar – fingið til vega upplýsingar um tey lesandi uttanfyri Norðurlond, og samanborið við tey føroysku lesandi í Danmark.

Vónandi kann henda lýsing geva eitt meira faktuelt kjak um, hvørt tað er vert at rinda fyri, at føroysk lesandi leita sær aðrastaðni enn til tey lond, har tey kunnu fáa sína útbúgving ókeypis.

Grundgevingin fyri at stuðla føroyingum í at fara út í heim at lesa er helst tankin um tann víðskygda borgaran, sum kann geva Føroyum nakað annað enn tey, ið fara til Danmarkar at lesa.

Hinvegin er óttin, at frástøðan til føroyska samfelagið kann gera at tey ikki koma aftur, og at tey tí bert eru ein útreiðsla, ið ongantíð fer at gagna føroyska samfelagnum.

Men henda kanning vísir, at tey, ið lesa uttanfyri Norðurlond, hava á leið líka stóran áhuga fyri føroyska samfelagnum sum tey, sum lesa í Danmark. Og hugurin hjá teimum at flyta heim er heldur ikki minni enn hann er millum lesandi í Danmark.

Harumframt vísir kanningin, at millum tey, ið lesa uttanfyri norðurlond, vilja færri búgva aðrastaðni enn í Føroyum; færri útihýsa møguleikanum at flyta heim - og tey siga seg í størri mun sakna lívið í Føroyum.

Lesandi uttanfyri Norðurlond halda í minni mun enn lesandi í Danmark, at føroyska samfelagið er ov konservativt og at sosialu skipanirnar í Føroyum eru ov vánaligar.

Kanningin vísir sum væntað, at tey lesandi uttanfyri Norðurlond hava eitt størri altjóða netverk. Og tað er eysæð, at tey, um tey koma heimaftur, hava eina vitan og nakrar royndir, sum gera føroyska samfelagið meira fjøltáttað og litríkt.

Sum væntað halda hesi fólkini, at ferðasambandið til Føroya er ov vánaligt í mun til teirra tørv. Tað ger, at møguleikarnir fyri sambandið eru skerdir.

At tey ikki eru so nógv saman við føroyingum har tey eru, ger sjálvsagt eisini, at sambandið til Føroyar kann vikna.

So er spurningurin, um hetta er vert at brúka pengar uppá. At tað er ein spurningur um pengar sæst greitt í kanningini: Um ÚSUN skipanin verður umløgd til lán, fara nógv færri útum Norðurlond at lesa. Hinvegin knýtir studningurin tey tættari at Føroyum, har tey nú eru.

Kappingin um fólk er hørð. Uttanlands eru fyritøkurnar ofta inni á sjálvum universitetunum og rekrutera dugnaligastu fólkini langt áðrenn tey eru liðug við lesnaðin. Og tølini vísa púra greitt, at skal arbeiðsmarknaðurin í Føroyum klára seg í hesi kappingini um komandi føroysku arbeiðsmegina, má meira gerast. Hóast fleiri átøk farnu árini hava styrkt sambandið millum føroyska arbeiðsmarknaðin og tann lesandi ungdómin, standa vit okkum framvegis ikki nóg væl í kappingini.

Vónandi kann henda lýsing vera hent hjá teimum, sum arbeiða við at knýta sterkari bond millum føroyska samfelagið og okkara lesandi ungdóm.

***Sjúrður Skaale***
***Fólkatingsmaður***

# Inngangur

Í 2008 gjørdi Danmarks Statistik eina kanning fyri Norðuratlantsbólkin á Fólkatingi. Henda kanning varð gjørd umvegis telefon, har ein stakroynd av føroyingum í fyrsta ættarliði millum 20 og 45 ár í Danmark fekk nakrar spurningar. Tá kanningin kom út í bóklingi, fekk hesin føroyska heitið: "Hví føroyingar búseta seg í Danmark."

Flestu føroyingar, ið fara út í heim sum ungfólk, gera hetta í lestrarørindum, og tað eru í stóran mun eisini hesi, tosað verður um, tá fólkafráflytingin verður nevnd í føroyska kjakinum.

Alsamt fleiri lesandi eru seinastu árini farin í onnur lond enn Danmark at lesa, og hetta hevur eisini fylt nógv í kjakinum í Føroyum. Tí verður henda samanberandi kanning gjørd.

## Endamál

Høvuðsendamálið í hesari kanning er at finna fram til, hvørjir munir eru á teimum, ið fara til Danmarkar at lesa og á teimum, ið fara út um Norðurlond at lesa – ella hvørt tað yvirhøvur er nakar munur. Fyri at finna fram til hetta er nærum sama spurnarblað sum Norðuratlantsbólkurin gjørdi til kanningina frá 2008 nýtt.

## Um stakroyndirnar

Í hesari kanning hevur Studni sent spurnarbløð út til 181 teldupostadressur hjá lesandi uttanfyri Norðurlond. Teldupostadressurnar hava tey lesandi sjálvi upplýst Studna. Tá spurnarbløðini vóru send út vóru 221 lesandi uttanfyri Norðurlond, og tí hava 82 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond teoretiskt havt møguleika fyri at svara. Av teimum 181 svaraðu 121. Tað er 67 prosent og svarar til 55 prosent av øllum teimum lesandi. Hetta verður mett at vera meira enn nøktandi, tá hugsað verður um, at yvir helvtin av øllum lesandi uttanfyri Norðurlond hava svarað. Tað er torført at greina fráfallið, men í mun til tey, sum als ikki hava fingið nakran teldupost, er greitt, at hesi ikki hava upplýst Studna um sín teldupost. Av restini kann hugsast, at ein stórur partur hevur upplýst eina teldupostadressu, sum síðan er skift út. Harafturat eru helst nøkur, ið tilvitað hava latið vera við at svara.

Úr tølum hjá Studna ber til at finna fram til, at landafrøðiliga er fráfallið púra javnt. Sostatt er tað ikki soleiðis, at lesandi í einum stað falla meira frá enn aðrastaðni.

Tølini, ið samanborið verður við í hesari kanning, eru tikin úr kanningini hjá Norðuratlantsbólkinum frá 2008, har 1505 tilvildarliga útvaldir føroyingar í Danmark í aldrinum 20-45 ár fingu møguleika at svara og 1022 luttóku. Tað er 68 prosent, og verður mett at vera nøktandi. Av hesum eru lesandi, sum fluttu til Danmarkar fyri at lesa, vald burturúr, og hesi gjørdust 132 í tali. At tey lesandi í kanningini frá 2008 eru so fá kann í ávísan mun vaksa um óvissuna í kanningini.

Tað vísir seg, at tey lesandi í Danmark eru eitt sindur eldri enn tey lesandi uttanfyri Norðurlond, og hetta kann sjálvandi ávirka úrslitini. Ein orsøk til hetta er, at tey lesandi í kanningini frá 2008 vóru vald út í 2007. Sostatt er umleið 1 ár gingið frá tí tey vóru vald út, til tey fingu høvi at svara.

Somuleiðis er greitt, at upplýsingarnir úr kanningini hjá Norðuratlantsbólkinum eru 5 ára gamlir, meðan teir í nýggju kanningini eru frá maimánaði í ár. Sostatt er ein búskaparkreppa farin fram millum kanningarnar, umframt at føroyska samfelagið í ávísan mun eisini er broytt seinastu 5 árini. Millum annað eru fleiri lesandi í dag enn fyri 5 árum síðan.

Báðar kanningar eru gjørdar í maimánaði, so árstíðin eigur ikki at ávirka úrslitini.

Tað kann ávirka kanningina, at tey lesandi uttanfyri Norðurlond hava svarað skrivliga uppá kanningina, meðan tey lesandi í Danmark hava svarað einum persóni í telefonini. Tað kann millum annað vera orsøkin til, at tey lesandi uttanfyri Norðurlond í størri mun svara “eg veit ikki” uppá nakrar av spurningunum.

Tað verður ikki gjørt nógv burturúr kynsbýtinum á teimum lesandi, tí hetta vísir seg at vera nærum tað sama í Danmark og uttanfyri Norðurlond. Í Danmark eru 62 prosent kvinnur og 38 prosent menn, meðan tað uttanfyri Norðurlond eru 63 prosent kvinnur og 37 prosent menn. Sostatt eru bólkarnir nærum heilt sambærligir á tí økinum.

## Henda útgáva

Fyrst í bóklinginum verður ein yvirskipað lýsing av føroyingum, sum lesa í Danmark og føroyingum, sum lesa uttanfyri Norðurlond. Síðan verður hugt eftir, hvat samband ávikavist lesandi í Danmark og lesandi uttanfyri Norðurlond hava við Føroyar. Í triðja partinum verður samanborið, hvørjar tankar lesandi í Danmark og lesandi uttanfyri Norðurlond hava um Føroyar. Í seinasta partinum verður hugt at viðurskiftum, sum serliga gera seg galdandi fyri tey, sum lesa uttanfyri Norðurlond.

Javnaðarflokkurin á Fólkatingi hevur saman við Studna útvegað upplýsingarnar um tey lesandi uttanfyri Norðurlond, meðan Regin Reinert, hagfrøðingur, hevur greinað tølini og tikið viðkomandi partin av kanningini hjá Norðuratlantsbólkinum frá 2008 út. Eirikur í Jákupsstovu (BA.jur) og Djóni Højgaard (BA.polit) hava stjórnað hesum bóklingi vegna Javnaðarflokkin á Fólkatingi.

# Yvirskipað um tey lesandi

Í hesum parti verður við talvum og myndum greitt frá grundleggjandi upplýsingum um kyn, aldur, hjúnastøðu og so framvegis hjá teimum lesandi í Danmark og teimum lesandi uttanfyri Norðurlond.




Tey lesandi uttanfyri Norðurlond eru sum heild yngri enn tey lesandi í Danmark. Miðalaldurin á teimum spurdu lesandi uttanfyri Norðurlond er 24,7 ár, meðan miðalaldurin á teimum lesandi í Danmark er 27,7 ár.

Hetta kemst í ávísan mun av, at tey lesandi í Danmark vórðu vald út í 2007 og vórðu spurd meira enn 1 ár seinni, og tí eru tey, sum hava búð í Danmark minni enn 1 ár, ikki við í kanningini.

Tó er eisini greitt, at tey lesandi í hesi kanning eisini eru farin yngri av landinum. Tøl hjá Studna vátta eisini, at fleiri eru farin av landinum at lesa síðan 2008, og tað kann benda á, at tey lesandi fara yngri av landinum.

Harafturat kann hugsast, at tað ikki eru eins nógv størv í Føroyum í dag sum tað vóru í 2008, og at hetta viðførir, at fólk sum heild fyrr fara undir lestur enn tey gjørdu tá.

Mynd 1 vísir, at meira enn helmingurin av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond er millum 20 og 24 ár, meðan 61 prosent av teimum lesandi í Danmark eru í aldursbólkinum millum 25 og 29 ár. 56 prosent av teimum

### Mynd 2: Hví flutti tú til landið, har tú býrt?




lesandi uttanfyri Norðurlond eru undir 25 ár, meðan 15 prosent av teimum lesandi í Danmark er undir 25 ár.

Samanbera vit, hví tey lesandi eru flutt av landinum, fara tey í flestu førum at lesa á universiteti. Tey lesandi uttanfyri Norðurlond velja harafturat í størri mun eina útbúgving á universiteti enn tey lesandi í Danmark. 93 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond lesa á universiteti. Talið er 70 prosent fyri tey lesandi í Danmark, sum eru flutt úr Føroyum til Danmarkar fyri at lesa.

Størsti parturin av teimum spurdu lesandi í Danmark, sum ikki valdu eina universitetsútbúgving, fóru av landinum fyri at taka ein yrkisútbúgving. Ongin av teimum uttanfyri Norðurlond í kanningini nevndi yrkisútbúgving sum orsøkina til, at tey fluttu av landinum.

Nærum restin av teimum lesandi í Danmark fluttu, tí tey fóru á eftirskúla. Tað nevndi ongin av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond sum orsøkina.

Tey lesandi uttanfyri Norðurlond, sum ikki lesa á universiteti, taka eina listarliga útbúgving, meðan nærum ongin segði seg taka listarliga útbúgving í Danmark í 2008.

Tey lesandi uttanfyri Norðurlond hava sum heild lisið í styttri tíð enn tey lesandi í Danmark. Yvir 60 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond hava lisið í 2 ár ella styttri, meðan hetta tal er undir 30 prosent fyri tey lesandi í Danmark. Sostatt hava umleið 70 prosent av teimum lesandi í Danmark svarað, at tey hava lisið í 3 ár ella longur, meðan hetta tal er um 40 prosent hjá teimum, sum lesa uttanfyri Norðurlond.




Harafturat er greitt, at einans 5 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond siga seg hava lisið í 5 ár ella longur, meðan hetta tal er nærum 30 prosent fyri tey lesandi í Danmark.

Hetta kann bæði hanga saman við, at tey lesandi uttanfyri Norðurlond sum heild eru yngri enn tey lesandi í Danmark, og at tað í dag eru fleiri lesandi, sum tí hava lisið í styttri tíð. Ein orsøk er tó uttan iva eisini, at í nógvum førum tekur tað 4 ár at gjøgnumføra eina universitetsútbúgving uttanfyri Norðurlond. Tað er til dømis galdandi fyri nógvar útbúgvingar í Stóra Bretlandi, har ein stórur partur av teimum uttanfyri Norðurlond lesa. Universitetsútbúgvingar í Danmark eru sum heild ásettar at taka 5 ár.

Eisini er greitt, at tey frá kanningini frá 2008 vóru vald út í 2007 og ikki vórðu spurd fyrr enn í 2008. Sostatt er ongin, sum er fluttur til Danmarkar í 2008 fyri at lesa, við í kanningini. Hetta ávirkar helst, hvussu leingi tey spurdu hava lisið.

Tey lesandi í Danmark hava í størri mun funnið sær maka enn tey lesandi uttanfyri Norðurlond. Yvir 60 prosent av teimum, sum lesa í Danmark eru annaðhvørt í hjúnalagi ella sambúgvandi, meðan hetta tal er undir 40 prosent hjá teimum uttanfyri Norðurlond.

Ein orsøk til hetta er uttan iva, at tey lesandi uttanfyri Norðurlond eru yngri enn tey lesandi í Danmark. Tað kann tó eisini hugsast, at tað er lættari at fara út um Danmark at lesa, um atlit ikki skal takast til onnur enn ein sjálvan.

Tey spurdu lesandi uttanfyri Norðurlond, sum eru í hjúnalagi ella eru sam-

## Mynd 4: Borgarlig støða




búgvandi, hava í eitt lítið sindur størri mun føroyskan maka enn tey lesandi í Danmark. Talan er tó um eitt sindur omanfyri 60 prosent í báðum førum. Eitt sindur minni enn 30 prosent av øllum teimum spurdu lesandi hava maka úr landinum, har tey eru.

Ein lítil partur av teimum lesandi hevur maka úr einum landi, sum hvørki er Føroyar ella landið, har tey eru.

Tó er greitt, at tey lesandi uttanfyri Norðurlond sum heild eru yngri og sum heild í minni mun hava ein maka. Tí eru tað í veruleikanum fleiri føroyingar, sum hava føroyskan maka í Danmark enn tað eru, sum hava føroyskan maka uttanfyri Norðurlond.

Ikki heilt óvæntað hava tey yngru og í størri mun støku lesandi uttanfyri Norðurlond í minni mun børn enn tey lesandi í Danmark.

## Mynd 5: Nationalitetur hjá hjúnarfelaga/sambúgva



## Mynd 6: Hvussu nógv børn eigur tú?




Undir 10 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond siga seg hava børn, meðan hetta tal liggur um 30 prosent fyri tey lesandi í Danmark.

Verður hugt eftir bústaðarviðurskiftunum, so búgva tey lesandi fyri tað mesta í leigubústaði. Tó búgva tey lesandi uttanfyri Norðurlond, sum eru yngri og í minni mun hava maka og børn, eitt sindur størri mun í leigubústaði. Talan er um yvir 90 prosent av teimum uttanfyri Norðurlond, meðan beint undir 80 prosent av teimum lesandi í Danmark búgva í leigubústaði.

Tey lesandi í Danmark og tey lesandi uttanfyri Norðurlond eru í størstan mun framvegis í landinum, har tey eru, tí tey eru undir útbúgving. Ein lítil partur av teimum lesandi í Danmark sigur tó, at tey eru har, tí tey hava stovnað familju har. Tað hevur ongin av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond svarað.

## Mynd 7: Hvussu býrt tú?



## Mynd 8: Hvør er høvuðsorsøkin til, at tú framvegis ert í landinum, sum tú ert í?




Munurin millum bólkarnar er sostatt lítil, og hugsast kann, at munurin meira hongur saman við aldri og hjúnastøðu enn landafrøði.

Tað er lítil munur millum tey í Danmark og tey uttanfyri Norðurlond, tá hugt verður eftir, hvaðani úr Føroyum tey koma. Umleið helvtin av teimum í Danmark og teimum uttanfyri Norðurlond kemur úr høvuðsstaðnum. Tølini benda tó á, at tey lesandi uttanfyri Norðurlond í størri mun koma av bygd enn tey lesandi í Danmark.

## Mynd 9: Hvar í Føroyum búði tú, áðrenn tú flutti til landið, har tú ert nú?



# Tilknýti til Føroyar

Tey lesandi uttanfyri Norðurlond hava eitt størri altjóða netverk enn tey lesandi í Danmark. Í Danmark eru 20 prosent, sum dagliga ella hvørja viku eru saman við vinfólkum, sum ikki eru úr landinum, har tey eru, meðan talið er yvir 80 prosent millum tey, ið lesa uttanfyri Norðurlond. Tey lesandi uttanfyri Norðurlond eru eisini meira saman við fólkum úr landinum, har tey eru, meðan Føroyingar í Danmark í nógv størri mun er saman við øðrum føroyingum enn føroyingar uttanfyri Norðurlond.

At lesandi føroyingar uttanfyri Norðurlond hava eitt meira altjóða netverk kann hanga saman við at fleiri teirra leita sær á altjóða skúlar, meðan tey í Danmark í størri mun ganga í donskum skúlum. Eisini kann hugsast, at útlendsk lesandi í einum landi sum heild koma nógv saman.

Ein orsøk til, at lesandi uttanfyri Norðurlond eru meira saman vinfólkum úr landinum, har tey eru, er helst, at møguleikin at vera saman við føroyingum ikki er tann sami sum í Danmark.

**Mynd 10: Sosial sambond**



Tá tey lesandi verða spurd, um tey kenna seg sum føroyingar ella sum verandi úr landinum, har tey eru, svara næstan øll, at tey kenna seg sum føroyingar. Tað eru 86 prosent av teimum lesandi í Danmark og 90 prosent av teimum uttanfyri Norðurlond. Munurin millum tey í Danmark og tey uttanfyri Norðurlond í kanningini er neyvan nóg stórur til, at vit kunnu staðfesta nakran veruligan mun.

### Mynd 11: Kennir tú teg mest sum føroying ella sum verandi úr landinum, har tú ert?




Tað er tó ein ábending um, at nøkur fleiri lesandi í Danmark kenna seg eins nógv sum føroyingar sum verandi úr landinum, har tey eru, enn tað er millum tey lesandi uttanfyri Norðurlond. Tað kann hugsast, at nøkur í kanningini frá 2008 eru hálvir danir og hálvir føroyingar, og at hesi kenna seg eins nógv sum føroyingar sum danir.

### Mynd 12: Hvussu stórt tilknýti kennir tú til Føroya?



Tey flestu lesandi kenna annaðhvørt eitt sera sterkt ella eitt sterkt tilknýti til Føroya. Nærum ongin munur er á bólkunum, hóast tað í prosentum eru eitt sindur fleiri uttanfyri Norðurlond, sum kenna eitt avmarkað ella onki tilknýti til Føroyar.

Hyggja vit eftir, nær tey lesandi seinast hava verið í Føroyum, hava tey allar flestu verið í Føroyum innanfyri seinasta árið. Samanumtikið er tað styttri tíð síðan tey lesandi í Danmark hava verið í Føroyum enn tey lesandi uttanfyri Norðurlond. Báðar kanningarnar eru gjørdar í maimánaði, so árstíðin ávirkar ikki úrslitið.

**Mynd 13: Nær vart tú seinast í Føroyum? (Síðan tú flutti av landinum)**




At tey lesandi uttanfyri Norðurlond sjáldnari eru í Føroyum og vitja, kann hanga saman við, at tað hjá teimum flestu av teimum er longri leið at ferðast enn hjá teimum lesandi í Danmark.

Tey lesandi uttanfyri Norðurlond hava í minni mun enn tey lesandi í Danmark tikið støðu til, hvar tey vilja búgva í framtíðini. 28 prosent av teimum uttanfyri Norðurlond siga seg ikki vita, hvar tey vilja búgva í framtíðini, meðan talið millum lesandi í Danmark er 5 prosent.

Millum tey lesandi í Danmark eru 48 prosent, sum siga seg vilja búgva í Føroyum í framtíðini, meðan tað millum tey lesandi uttanfyri Norðurlond eru 43 prosent. Hóast tað sostatt eru eitt sindur fleiri lesandi í Danmark, sum siga seg vilja flyta til Føroya, so er eisini ein nógv størri partur av teimum, sum sigur seg vilja vera verandi í Danmark. 23 prosent av teimum lesandi í

**Mynd 14: Hvar vilt tú helst búgva í framtíðini?**




Danmark siga seg vilja vera verandi í landinum, har tey eru, meðan 6 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond hava tikið støðu til at vera verandi í landinum, har tey eru.

At tey lesandi uttanfyri Norðurlond í minni mun vita, hvar tey vilja búgva í framtíðini, kann hanga saman við, at tey eru yngri, ikki hava maka og børn og tí eru minni bundin.

Kanningin frá 2008 vísti tó eisini, at longri tíðarskeiðið í Danmark gjørdist, minni gjørdust sannlíkindini fyri, at føroyingar í Danmark ætlaðu at flyta til Føroya. Tí kann tað ávirka úrslitið, at tey lesandi uttanfyri Norðurlond sum heild hava búð har í lutfalsliga stutta tíð.

**Mynd 15: Hvussu ofta hugsar tú um at flyta til Føroya?**



Hyggja vit eftir teimum, sum hava tikið støðu til spurningin – tað vil siga, at tey, sum ikki siga seg vita, eru tikin burtur – eru 60 prosent av teimum uttanfyri Norðurlond, sum siga seg vilja búgva í Føroyum, meðan talið millum lesandi í Danmark er 51 prosent.

Tað er rættiliga ójavnt, hvussu ofta tankin at flyta til Føroya stingur seg upp í huganum á teimum lesandi. Um 30 prosent av teimum lesandi í Danmark og uttanfyri Norðurlond siga seg ofta hugsa um at flyta til Føroya, meðan 23 prosent siga seg sjáldan hugsa um at flyta til Føroya.

Tey lesandi uttanfyri Norðurlond siga seg í størri mun av og á hugsa um at flyta til Føroya enn tey lesandi í Danmark.

Ein munur er tó eisini, at 17 prosent av teimum í Danmark siga seg ongantíð hugsa um at flyta til Føroya, meðan hetta tal er 7 prosent fyri tey uttanfyri Norðurlond.

Ein orsøk til hetta kann vera, at tey lesandi uttanfyri Norðurlond eru yngri og ikki á sama hátt hava fest røtur sum tey lesandi í Danmark.

Samanborið við tey lesandi í Danmark nokta tey lesandi uttanfyri Norðurlond í minni mun fyri, at tey høvdu tikið part av útbúgvingini í Føroyum, um hetta var gjørligt. 63 prosent av teimum lesandi í Danmark søgdu, at tey ikki høvdu tikið alla ella ein part av útbúgvingini í Føroyum, um hetta var gjørligt. Fyri tey uttanfyri Norðurlond er hetta tal 40 prosent.

**Mynd 16: Hevði tú tikið alla ella ein part av útbúgvingini í Føroyum, um hetta var gjørligt?**



Tey lesandi uttanfyri Norðurlond vita tó í minni mun, hvørt tey høvdu tikið ein part ella alla útbúgvingina í Føroyum, um hetta var gjørligt. 30 prosent uttanfyri Norðurlond og 3 prosent í Danmark svara, at tey ikki vita.

Umleið eins nógv uttanfyri Norðurlond og í Danmark, millum 30 og 35 prosent, siga, at tey høvdu tikið útbúgvingina í Føroyum, um hetta var gjørligt.

At tey lesandi uttanfyri Norðurlond í minni mun vísa aftur, at tey høvdu tikið alla ella ein part av útbúgvingini í Føroyum kann hanga saman við, at 5 ár eru liðin síðan kanningin av teimum í Danmark varð gjørd og at fleiri møguleikar eru á Fróðskaparsetrinum í dag.

**Mynd 17: Hvussu ofta brúkar tú føroyskar miðlar?**




Tølini vísa, at lesandi føroyingar í Danmark í størri mun brúka føroyskar miðlar enn tey, sum lesa uttanfyri Norðurlond. 64 prosent av teimum spurdu í Danmark brúka føroyskar miðlar hvønn dag, meðan 48 prosent av teimum uttanfyri Norðurlond siga seg nýta teir hvønn dag. Tó eru 29 prosent uttanfyri Norðurlond, sum brúka teir hvørja viku, og hetta er eitt sindur fleiri enn í Danmark, har talan er um 25 prosent.

Umleið ein fimtingur av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond brúkar føroyskar miðlar hvønn mánað ella sjáldnari, meðan hetta tal liggur beint omanfyri 10 prosent av teimum lesandi í Danmark.

Sostatt brúka lesandi uttanfyri Norðurlond í minni mun føroyskar miðlar enn lesandi í Danmark, hóast kanningin av teimum í Danmark varð gjørd fyri 5 árum síðan.

Tað kann ávirka hetta úrslitið, at lesandi í Danmark koma meira saman við øðrum føroyingum, og tí kjakast meira um føroysk viðurskifti enn tey lesandi uttanfyri Norðurlond, sum í nógv størri mun ferðast í einum altjóða umhvørvi.

Hyggja vit eftir, hvussu áhugað tey lesandi eru í føroyskum politikki, sæst lítil munur millum tey lesandi í Danmark og tey lesandi uttanfyri Norðurlond. Ein lítil triðingur sigur seg hava stóran áhuga, ein góður triðingur sigur seg hava eitt sindur av áhuga og síðsti triðingur sigur seg hava avmarkaðan ella ongan áhuga.

Tey lesandi uttanfyri Norðurlond hava sostatt nærum eins stóran áhuga fyri føroyskum politikki sum tey lesandi í Danmark, hóast tey ikki í eins stóran mun brúka føroyskar miðlar, í minni mun koma saman við øðrum føroyskum lesandi og sum heild hava minni við føroysk samfelagsviðurskifti at gera.

**Mynd 18: Hvussu áhugað/ur ert tú í føroyskum politikki?**



# Hugsanir um Føroyar

Í hesum parti verður samanborið, hvørji sjónarmið tey lesandi ávikavist í Danmark og uttanfyri Norðurlond hava um føroyska samfelagið og sín egna leiklut í tí. Fyrst verður hugt at, hvørjar hugsanir tey lesandi hava um, hvussu samfelagið er háttað hugsjónarliga og hvat tey halda um arbeiðsmøguleikarnar. Síðan verður viðgjørt, hvat tey lesandi halda um viðurskifti, sum snúgva seg um familjuna. Eftir hetta verður hugt at, hvat tey lesandi halda um frítíðar- og náttúrumøguleikar. At enda verður greitt frá, hvat tey lesandi meta um ferðasambandið til Føroya.

**Mynd 19: Føroyska samfelagið er ov konservativt?**




Lesandi uttanfyri Norðurlond halda í minni mun enn lesandi í Danmark, at føroyska samfelagið er ov konservativt. 31 prosent av teimum uttanfyri Norðurlond siga seg vera sera samd í, at føroyska samfelagið er ov konservativt. 39 prosent siga seg vera samd. 42 prosent av teimum lesandi í Danmark siga seg vera sera samd í, at føroyska samfelagið er ov konservativt, meðan 41 prosent siga seg vera samd. Sostatt eru 70 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond, sum halda føroyska samfelagið vera ov konservativt, meðan hetta tal er 83 prosent hjá teimum lesandi í Danmark.

25 prosent av teimum uttanfyri Norðurlond siga seg annaðhvørt vera ósamd ella púra ósamd í, at føroyska samfelagið er ov konservativt, meðan 16 prosent av teimum í Danmark meta tað sama.

Tað er greitt, at 5 ár eru ímillum kanningarnar, og tí kann hugsast, at føroyska samfelagið er broytt eitt sindur, og at hetta ávirkar hugsanirnar hjá teimum lesandi. Hetta ger seg millum annað greitt í spurninginum um tey samkyndu. Men tað kann eisini hugsast, at tey, sum fara útum Norðurlond, lesa í konservativari londum enn Danmark, og nýta tað landið at samanbera við. Harafturat er ein møguleiki fyri, at tey lesandi uttanfyri Norðurlond í minni mun hava nakað ímóti, at eitt land er konservativt.

Tey lesandi úti í heimi ynskja í stóran mun at skapa búskaparliga og mentanarliga framgongd í Føroyum. 85 prosent av teimum lesandi í Danmark siga seg vera sera samd ella samd í hesum, meðan 87 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond siga seg ynskja tað sama.

Tó kann hugsast, at tey lesandi uttanfyri Norðurlond í eitt sindur størri mun ynskja at skapa búskaparliga og mentanarliga framgongd í Føroyum, tí 53 prosent av teimum siga seg vera sera samd. Hetta tal er 40 prosent fyri tey lesandi í Danmark.

12 prosent av teimum lesandi í Danmark siga seg vera ósamd ella púra ósamd í hesi útsøgn, meðan 8 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond hava eina negativa hugsan um at skapa búskaparliga og mentanarliga framgongd í Føroyum.

Snýr tað seg um fakligu avbjóðingarnar, so er tey lesandi uttanfyri Norður-lond eitt sindur negativari enn tey lesandi í Danmark. Nærum 90 prosent av

**Mynd 20: Arbeiðslív**



teimum lesandi uttanfyri Norðurlond siga seg vera sera samd ella samd í, at fakligt umhvørvi og fakligar avbjóðingar mangla í Føroyum. Hetta tal er um 85 prosent millum tey lesandi í Danmark.

Hyggja vit longur inn í tølini sæst, at 49 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond siga seg vera sera samd í, at fakligar avbjóðingar og eitt fakligt umhvørvi mangla í Føroyum, meðan 40 prosent siga seg vera samd. Hesi tøl eru fyri tey lesandi í Danmark ávikavist 42 prosent fyri hvørt.

Millum tey lesandi uttanfyri Norðurlond eru 7 prosent, sum siga seg vera ósamd ella sera ósamd í, at eitt fakligt umhvørvi og fakligar avbjóðingar mangla í Føroyum. Hetta tal er 13 prosent fyri tey lesandi í Danmark.

Hetta úrslitið kann eisini vera ávirkað av, at tey lesandi í Danmark vórðu spurd fyri 5 árum síðan, og fíggjarkreppan sum heild hevur avmarkað starvsmøguleikarnar í øllum vesturheiminum.

Tey lesandi í Danmark halda sum heild minni um sosialu skipanirnar í Føroyum enn tey lesandi uttanfyri Norðurlond.

**Mynd 21: familjulív**




39 prosent av teimum lesandi í Danmark siga seg vera sera samd í, at sosialu skipanirnar í Føroyum eru ov vánaligar, meðan 30 prosent siga seg vera samd. Hesi tøl eru ávikavist 18 prosent og 34 prosent fyri tey lesandi uttanfyri Norðurlond.

35 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond siga seg hinvegin vera ósamd ella púra ósamd í útsøgnini um, at sosialu skipanirnar í Føroyum eru ov vánaligar. Hetta tal er 14 prosent fyri tey lesandi í Danmark.

Hetta kann ávirkast av, at sosialu skipanirnar í Danmark sum heild eru á hægri stigi enn sosialu skipanirnar uttanfyri Norðurlond.

Tey lesandi uttanfyri Norðurlond halda í minni mun, at tað er torført at finna ein bústað í Føroyum enn tey lesandi í Danmark. 15 prosent av teimum uttanfyri Norðurlond siga seg vera sera samd í útsøgnini, at tað er trupult at finna eitt stað at búgva í Føroyum, meðan 24 prosent siga seg vera samd í útsøgnini. Millum tey lesandi í Danmark eru 29 prosent sera samd og 31 prosent samd. Sostatt eru 39 prosent uttanfyri Norðurlond, sum halda tað vera trupult at finna eitt stað at búgva í Føroyum, meðan 60 prosent av teimum lesandi í Danmark hava hesa hugsan.

Hinvegin eru tað nærum líka nógv í Danmark og uttanfyri Norðurlond, sum halda tað vera rímiliga lætt at finna ein bústað í Føroyum. Bæði í Danmark og uttanfyri Norðurlond eru 23 prosent, sum siga seg vera ósamd í útsøgnini. Í Danmark eru 14 prosent, ið siga seg vera púra ósamd, og uttanfyri Norðurlond 6 prosent, sum siga seg vera púra ósamd.

Stóri munurin á bólkunum er millum tey, sum siga, at tey ikki vita. Talan er um 33 prosent av teimum uttanfyri Norðurlond og 4 prosent av teimum í Danmark.

Her kann tað hugsast at ávirka úrslitið, at tey lesandi uttanfyri Norðurlond sum heild eru yngri enn tey lesandi í Danmark, og tí ikki hava hugsað so nógv um spurningin. Harafturat kann hugsast, at møguleikarnir at finna ein bústað í Føroyum er betraðir síðan 2008.

Bæði fyri tey lesandi í Danmark og fyri tey lesandi uttanfyri Norðurlond hevur tað stóran týdning at vera saman við vinum og familju í Føroyum. 95 prosent av teimum spurdu uttanfyri Norðurlond siga seg vera samd ella sera samd í útsøgnini, meðan talið er 94 prosent fyri tey lesandi í Danmark. Tó eru tað í bólkinum millum tey lesandi uttanfyri Norðurlond eitt sindur færri, 58 prosent, sum siga seg vera sera samd í útsøgnini, meðan tað eru 65 prosent av teimum lesandi í Danmark, sum siga seg vera sera samd.

**Mynd 22: Barnalív**




Tey lesandi halda í stóran mun, at Føroyar eru eitt gott stað hjá børnum at vaksa upp. 94 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond og 97 prosent av teimum lesandi í Danmark siga annaðhvørt, at tey eru sera samd ella samd í útsøgnini um, at Føroyar eru eitt gott stað hjá børnum at vaksa upp. Tey lesandi í Danmark svara í eitt sindur størri mun, at tey eru sera samd, enn tey lesandi uttanfyri Norðurlond. Talið er 70 prosent fyri tey í Danmark og 62 prosent fyri tey uttanfyri Norðurlond.

Tey lesandi í uttanfyri Norðurlond og í Danmark eru samd um, at børnini hjá teimum skulu læra føroyskt. 91 prosent av teimum uttanfyri Norðurlond siga seg vera sera samd ella samd í hesi útsøgn, meðan 95 prosent av teimum lesandi í Danmark hava hesa áskoðan.

Viðvíkjandi barnaansingarøkinum siga 46 prosent av teimum lesandi í Danmark, at tey eru sera samd ella samd í útsøgnini, at barnaansingarøkið í Føroyum er ikki nøktandi. Hetta tal er munandi lægri millum tey lesandi uttanfyri Norðurlond, har 24 prosent annaðhvørt siga seg var samd ella sera samd í útsøgnini.

Ein stórur partur av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond sigur seg ikki vita, hvørja hugsan tey hava um barnaansingarøkið. Talan er um 46 prosent. Hetta tal er 31 prosent fyri tey lesandi í Danmark.

Úrslitið av spurninginum viðvíkjandi barnaansingarøkinum kann vera merkt av, at tey lesandi uttanfyri Norðurlond sum heild eru ung og tí ikki hava

hugsað um spurningin. Harafturat eru trupulleikar við at fáa ansingarpláss ikki nakað, sum hevur verið nógv frammi seinastu tíðina.

Tá tað snýr seg um skúlarnar, eru tey lesandi uttanfyri Norðurlond eitt sindur minni negativ enn tey, sum lesa í Danmark. 43 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond siga seg vera sera samd ella samd í útsøgnini: "Eg stúri fyri vánaliga umdøminum hjá føroyska fólkaskúlanum". 55 prosent av teimum lesandi í Danmark geva hesi svar.

37 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond siga seg vera ósamd ella sera ósamd í, at tey stúra fyri umdøminum hjá føroyska fólkaskúlanum. Hesum eru 41 prosent av teimum lesandi í Danmark samd í.

Parturin, sum ikki sigur seg vita, er 20 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond og 5 prosent av teimum lesandi í Danmark.

Á vári í 2008, tá kanningin millum tey lesandi í Danmark varð gjørd, var nógv kjak í Føroyum um fólkaskúlan, tí PISA-úrslitini ikki vóru mett at vera nøktandi. Eitt tílíkt kjak hevur ikki verið í vár, og tað kann ávirka úrslitið.

Størsti parturin av teimum lesandi úti í heimi halda veðrið í Føroyum vera ov vánaligt. Men tað vísir seg, at tey lesandi uttanfyri Norðurlond hava eina positivari fatan av veðrinum enn tey lesandi í Danmark. 27 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond siga seg vera sera samd í, at veðrið í Føroyum er ov vánaligt. Tað sama svara 43 prosent av teimum lesandi í

## Mynd 23: Frítíðarlív



Danmark. 40 prosent uttanfyri Norðurlond og 36 prosent í Danmark siga seg vera samd.

39 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond siga seg vera ósamd ella púra ósamd í útsøgnini, meðan 21 prosent av teimum lesandi í Danmark siga seg hava somu áskoðan.

Her kann tað ávirka úrslitið, at tey flestu uttanfyri Norðurlond lesa í Stórabretlandi, har veðrið á nógvan hátt kann minna um tað í Føroyum. Eisini kann hugsast, at tey uttanfyri Norðurlond ikki koma eins nógv í samband við føroyingar, sum minna tey á, hvussu veðrið í Føroyum er.

Tá tað snýr seg um at sakna føroysku náttúruna, eru tey spurdu lesandi púra samd. Beint undir 60 prosent siga seg vera sera samd í útsøgnini um, at tey sakna føroysku náttúruna, góð 30 prosent siga seg vera samd, undir 10 prosent siga seg vera ósamd, og nøkur heilt fá siga seg vera púra ósamd.

Verður hugt at í hvønn mun tey lesandi sakna føroysku frítíðarítrivini, so eru tað tey lesandi uttanfyri Norðurlond, sum sakna tey mest. 60 prosent av teimum uttanfyri Norðurlond siga seg annað hvør vera samd ella sera samd í, at tey sakna føroysku frítíðarítrivini. 42 prosent av teimum lesandi í Danmark geva hetta svar.

Ein meiriluti av teimum lesandi í Danmark, 58 prosent, siga seg vera ósamd ella púra ósamd í, at tey sakna frítíðarítrivini í Føroyum, meðan hetta tal er 37 prosent hjá teimum lesandi uttanfyri Norðurlond.

## Mynd 24: Reglusemið á flogferðum til Føroya er ov vánaligt?



Hetta kann ávirkast av, at tey lesandi í Danmark eru oftari í Føroyum enn tey uttanfyri Norðurlond og at tað ber til at gera nógv saman við øðrum føroyingum í Danmark.

Hóast tey lesandi uttanfyri Norðurlond í størri mun sakna frítíðarítrivini í Føroyum, so eru tey nærum samd við teimum lesandi í Danmark um, at útboðið av frítíðarítrivum og mentanarligum tilboðum í Føroyum er ov vánaligt. 61 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond siga seg vera sera samd ella samd í hesum, meðan hetta tal er 64 prosent fyri tey, sum lesa í Danmark.

Næstan 60 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond halda reglusemið á flogferðum til Føroya vera ov vánaligt. 30 prosent siga seg vera sera samd í útsøgnini, meðan 29 prosent siga seg vera samd í hesi útsøgn. Til samanberingar eru undir 40 prosent av teimum lesandi í Danmark, sum hava hesa hugsanina, at reglusemið á flogferðunum til Føroya er ov vánaligt. 17 prosent siga seg vera púra samd og 19 prosent siga seg vera samd.

Hyggja vit at teimum, sum siga seg vera ósamd ella púra ósamd í, at reglusemið er ov vánaligt, so er talið 62 prosent millum tey lesandi í Danmark og 38 prosent millum tey lesandi í Norðurlondum.

Rættiliga sannlíkt er úrslitið merkt av, at leiðin hjá teimum uttanfyri Norðurlond er longri til Føroya enn tað er hjá teimum, sum lesa í Danmark. Eisini kann ávirka, at talan er um aðrar flogleiðir enn júst millum Føroyar og Danmark. Til dømis er oftari beinleiðis samband millum Keypmannahavn og Vágar enn tað er millum London og Vágar.

# Serligt fyri tey uttanfyri Norðurlond

Í hesum partinum verður hugt at teimum spurningum, sum einans tey uttanfyri Norðurlond hava svarað uppá. Tað er millum annað, hví tey valdu okkurt annað land enn Danmark, hvørjar hugsanir tey hava um ÚSUN-skipanina og hvar í heiminum tey lesa.

**Mynd 25: Hví fórt tú ikki, sum nógvir aðrir føroyingar, til Danmark at lesa? (Her ber til at velja fleiri møguleikar)**




Tey flestu lesandi uttanfyri Norðurlond eru samd um, at tey ikki valdu Danmark, tí tey halda, at Føroyar hava tørv á fólkum, sum lesa aðrastaðni enn í Danmark og at tey vildu royna okkurt nýtt og spennandi. Um 80 prosent hava valt hesar báðar møguleikar.

Nærum 60 prosent siga somuleiðis, at tey helst vildu sleppa undan at gerast partur av føroyska útisetaumhvørvinum í Danmark, men vildu standa meira á egnum beinum.

Um 20 prosent av teimum lesandi søgdu, at teirra útbúgving ikki kann

**Mynd 26: Hvat fært tú burturúr at lesa uttanfyri Norðurlond? (Her ber til at velja fleiri møguleikar)**




**Mynd 27: Hvat metir tú, at Føroyar fáa burturúr, at tú lesur uttanfyri Norðurlond? (Her ber til at velja fleiri møguleikar)**



takast í Danmark, at útbúgvingarstøðið er hægri í landinum, har tey lesa. Nærum eins nógv, hava hartil sagt, at teimum ikki dámar í Danmark

Í hesum spurningi bar til at velja fleiri svarmøguleikar.

Umleið 90 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond meta, at tey fáa persónlig sambond út um ríkisfelagsskapin, at tey fáa ein víðari sjónarring enn tann, sum sæst úr ríkisfelagsskapinum og at tey fáa ein øðrvísi mentanarligan og fakligan íblástur.

Eitt sindur meira enn 30 prosent meta, at tey fáa eina útbúgving, sum ger tey skjótari tøk á arbeiðsmarknaðinum, og umleið 25 prosent meta, at tey fáa eina útbúgving á hægri stigi enn Norðurlond kunnu bjóða.

Eisini í hesum spurningi bar til at svara fleiri svarmøguleikum.

Verður spurt, hvat Føroyar fáa burturúr, at nøkur velja at fara útum Norðurlond at lesa, so siga umleið 90 prosent, at Føroyar fáa fólk við einum víðari sjónarringi og einum øðrvísi mentanarligum og fakligum íblástri. Hetta svarar neyvt við tað, sum tey svaraðu í mun til, hvat tey sjálvi fáa burturúr.

70 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond siga, at Føroyar fáa fólk við persónligum sambondum út um ríkisfelagsskapin. Hetta er eitt sindur færri enn tá spurt var um, hvat tey lesandi sjálvi fáa burturúr.

## Mynd 28



Tá talan er um hinar báðar møguleikarnar, sum snúgva seg um at vera skjótari tøkur á arbeiðsmarknaðinum og eitt hægri útbúgvingarstig, eru ávikavist 30 og 20 prosent, sum meta tað. Hetta svarar nøkulunda við tað, sum tey siga, at tey sjálvi fáa burturúr.

Eisini í hesum spurningi bar til at velja fleiri svarmøguleikar.

Tey lesandi uttanfyri Norðurlond halda í stóran mun, at tað er eitt vánaligt hugskot at gjøgnumføra ætlanina partvís at leggja útbúgvingarstuðulin til lesandi uttanfyri Norðurlond (ÚSUN) um til lán.

2 prosent siga seg vera sera samd í, at tað er eitt gott hugskot partvíst at leggja stuðulin um til lán, 15 prosent meta siga seg vera samd, meðan 18 prosent siga seg vera ósamd og 62 prosent siga seg vera púra ósamd. 3 prosent siga seg ikki vita.

Her kann hugsast, at tey lesandi uttanfyri Norðurlond í ávísan mun svara negativt uppá spurningin av egnum økonomiskum orsøkum.

96 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond svara, at tað annaðhvørt eru samd ella sera samd í útsøgnini: "Eg hugsi ofta um, at ein partur av mínari útbúgving verður goldin úr Føroyum". 3 prosent siga seg vera ósamd við hesi útsøgn, meðan 1 prosent sigur seg vera sera ósamd. 1 prosent sigur seg ikki vita.

Tá spurt verður um, hvørt tey høvdu lisið uttanfyri Norðurlond, hóast tey ikki fingu ÚSUN, eru tey lesandi meira ymisk á máli. Størsti bólkurin á 33 prosent sigur, at tey eru sera ósamd, meðan næststørsti bólkurin á 27 prosent sigur, at tey eru ósamd. Sostatt er ein meiriluti, sum sigur, at tey ikki høvdu lisið uttanfyri Norðurlond, um tey ikki fingu ÚSUN. Hinvegin eru 8 prosent, sum siga, at tey eru sera samd, at tey høvdu lisið uttanfyri Norðurlond kortini, meðan 15 prosent siga, at tey eru samd. Sostatt siga yvir 20 prosent, at tey óansæð stuðul úr Føroyum høvdu lisið uttanfyri Norðurlond.

17 prosent siga seg ikki vita.

56 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond, sum luttaka í kanningini, lesa í Stóra Bretlandi. Hetta hongur rímiliga væl saman við veruliga talinum, sum sambært upplýsingum frá Studna er 60 prosent.

**Mynd 29: Hvørjum landi lesur tú í?**




Í næstmest mun lesa tey spurdu í Norðuramerika og Póllandi, har ávikavist 12 prosent av teimum spurdu lesa í hvørjum av støðunum. Sambært veruligu tølunum hjá Studna eru smá 14 prosent av teimum lesandi uttanfyri Norðurlond í USA, og smá 12 prosent í Póllandi.

8 prosent av teimum, sum hava svarað, eru í Evropa annars. Veruliga talið er smá 7 prosent.

7 prosent av teimum, sum hava svarað, lesa í Avstralia og Osiania, meðan veruliga talið er 5 prosent.

Asia og Suðuramerika eru í kanningini umboðað við 2 prosentum hvørt, meðan veruliga talið er 2 prosent í Asia og smá 2 prosent í Suðuramerika. Ongin lesandi er í Afrika.

Sostatt eru landafrøðiligu økini lutfalsliga rætt umboðað í kanningini í mun til veruleikan.

Uppseting / layout: Grafikmaster Prent: Prenta